## Sníkiskjúttin avrættaður



John Allen Muhammad, sum myrdi fleiri fólk í amerikanska høvuðsstaðnum Washington og har um vegir í 2002, varð í nátt tikin av døgum í Greenville-fongslinum í statinum Virginia. Í oktober í 2002 myrdi hann 10 tilvildarlig fólk, og ikki fyrr enn tríggjar vikur aftan á tað fyrsta morðið eydnaðist tað løgregluni at finna tann 41 ára gamla John Allen Muhammad og hjálparmann hansara, tann 17 ára gamla Lee Boyd Malva. Tvey ár seinni varð John Allen Muhammad dømdur til deyða, og í nátt varð hann tikin av døgum við einari eiturssproytu. Le Boyd Malva hevur fingið lívlanga fongsulsrevsing.

## Fimleik í fokus í Müllers Pakkhúsi

Í samband við at Havnar Fimleikafelag verður 100 ár í ár, verður skipað fyri ymiskum tiltøkum. Leygardagin 14. november kl. 15 verður eitt áhugavert tiltak í Müllers Pakkhúsi har evnið er »Fimleik í Fokus«. Her fara umboð fyri øll fimleikafeløgini í landinum og Fimleikasambandið at umrøða og kjakast um fimleik. Týskvøldið 17. november kl. 19.00 verður eitt annað áhugavert tiltak í Müllers Pakkhúsi har evnið er »Fimleik sum lívsstíl«. Har fara Sjúrður Johannesen, sosialráðgevi, Helle Drews, fysioterapeutur, Magni Mohr, ítróttargransskari, Bergur Godtfred, lærari og bachelor í psykologi og Erika Hayfield, granskari at umrøða og kjakast um fimleik sum lívsstíl. Bæði tiltøkini eru almenn og ókeypis.

# Tað er feitt at v

**250.000 krónur um mánaðin. Tað er mánaðarlønin hjá best lønta stjóra. Skal tú vera stjóri, loysir tað seg best at satsa upp á bankavinnuna, hóast tað er hon, sum kanska flýtur tyngst í løtuni**

